VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið



Veðrið í morgin og leygardagin:
Fleyr til gul av ymsum ættum, seinni mest av landnyrðingi. Turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 8 og 12 stig.



Veðrið sunnudagin:
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Lot til andøvsgul av landnyrðingi, týsdagin lot av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 8 og 12 stig.

Hjálpa indiánarum í Paraguay

38 børn í frítíðarskúlanum oman Mattalág í Havn hava seinastu vikuna spælt indianarar. Í gjár vitjaði Flemming Petersen hjá teimum, har hann við orðum og myndum greiddi frá indianaralívi í Paraguay

BARNAGARÐUR
Rólant Waag Dam
rolant@sosialurin.fo

Hesi 38 børnini, ið ganga í 1. og 2. flokki, hava brúkt nógva tíð á verkstaðnum í síðstuni. Tey hava seymað klæði, gjørt perlur og pynt, málað andlitið og grillað.

Frítíðarskúlin oman Mattalág í Havn hevur indianaraviku, og børnini eru ovurfegin. Í gjár vitjaði Flemming Petersen hjá teimum. Flemming er ævintýrari og tónleikari, og hevur búð millum indianarar í Paraguay. Við orðum og myndum greiddi hann frá síni tíð ímillum indianarar, meðan børnini sótu pinnastill og lurtaðu.

Børnini í frítíðarskúlanum oman Mattalág í Havn, saman við starsfólkum og Flemming Petersen, sum stendur á knæ mitt í myndini. Myndina fer hann at taka við sær til Paraguay at vísa indianarabørnunum har
Mynd: Jens Kr. Vang

Savna pengar

Men indianaravikan er meiri enn spæl, andlitsmáling og søgur. Børnini í frítíðarskúlanum oman Mattalág hava eisini savnað pening saman, sum tey ætla at geva indianarabørnunum í Paraguay. Flemming Petersen fer at taka innsavnaða peningin við sær næstu ferð hann vitjar í Paraguay. Hann sigur, at helst fara indianararnir at brúka pengarnar til eina gravimaskinu, sum fer at lætta nógv um teirra arbeiði.

Í frítíðarskúlanum oman Mattalág ætla tey, at indianaravikan verður eitt afturvendandi tiltak, og at tey aftur næsta ár kunnu hjálpa indianarunum í Paraguay.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	12
Nuuk	--
Qaqortoq	9
Ammassalik	8
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	11
Seyðisfjørður	9
Tórshavn	10
Lerwick	10
Aberdeen	10
London	16
Tromsø	--
Bergen	22
Oslo	--
Stokkhólm	25
Keypmannah.	21
Helsinki	21
Moskva	18
Berlin	22
Warzawa	27
Kiev	22
Bukarest	25
Paris	24
Madrid	24
Róm	22
Malorca	--
Athen	25
Malta	23
Tunis	29
Beijing	32
New Dehli	39
Bangkok	34
Jakarta	31
Sydney	14
New York	21
Miami	28
Los Angeles	18
Meksikobýur	25
Panama	--
La Paz	15
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	19

LUFTTRÝSTIÐ

Í gjár:
Eitt hátrýst, 1016 hPa. vestan fyri Føroyar fer spakuliga eystureftir.



Í dag:
Hátrýstið yvir Føroyum fer spakuliga norðureftir. Lágtrýstið sunnan fyri Írland fer móti Norðsjónum.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 11/6 kl. 06^{00} – 12/6. 06^{00}. Hitin í gjár: 9,9°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° - Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 11/6 kl. 06^{00}– 12/6 kl. 06^{00}
Avfallið higartil í juni: 3,0 mm

VESTFALLSKYRRINDI

8. juni Seinna kvarter
12. juni Mánin næstur jørðini
15. juni Tendring

Kelda: Almanakkin 2007

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
14. Juni	06.24	18.55	05.24	17.55	05.39	18.10	08.24	20.55	09.24	21.55	04.39	17.10	03.39	16.10	06.39	19.10	07.39	20.10	06.09	18.40	07.24	19.55
15. Juni	07.26	19.57	06.26	18.57	06.41	19.12	09.26	21.57	10.26	22.57	05.41	18.12	04.41	17.12	07.41	20.12	08.41	21.12	07.11	19.42	08.26	20.57
16. Juni	08.27	20.57	07.27	19.57	07.42	20.12	10.27	22.57	11.27	23.57	06.42	19.12	05.42	18.12	08.42	21.12	09.42	22.12	08.12	20.42	09.27	21.57
17. Juni	09.25	21.53	08.25	20.53	08.40	21.08	11.25	23.53	-	12.25	07.40	20.08	06.40	19.08	09.40	22.08	10.40	23.08	09.10	21.38	10.25	22.53
18. Juni	10.18	22.43	09.18	21.43	09.33	21.58	-	12.18	00.53	13.18	08.33	20.58	07.33	19.58	10.33	22.58	11.33	23.58	10.03	22.28	11.18	23.43